# Vatnflóð í Vestmanna

**Í áarførinum týsdagin kom meira vatn í Hórará í Vestmanna, enn gott var. Tað fleyt yvir og fylti okkurt tún á veg undan brekkuni**

VATN
*Edvard Joensen*

Arbeiði við nýggju útstykkingini í Vestmanna gjørdi, at vatn rann inn í túnini hjá fólki í grannalagnum týsdagin.

Vestmanna Kommuna er í ferð við at gera eina nýggja útsykking klára uttan fyri Hórará í grannalagnum hjá Miðalsbrekku.

Í hesum sambandi hava teir gjørt eina byrging um ánna og lagt rør í, so vatnið kortini skal kunna renna, sum vanligt.

Men í áarførinum týsdagin svølgdu rørini ikki, og vatnið floymdi upp um byrgingina. Tað gjørdi, at tað rann aðrar vegir, enn vanligt hevur verið og ætlað var, sigur Hilbert Elisson hjá Vestmanna Kommunu.

Úrslitið var so, at tað floymdi inn á okkurt tún í grannalagnum, sum legðist undir. Onkur sandrúgva, sum lá á leiðini varð tikin við, og møguliga er onkur smærri skaði hendur, sigur hann. Men seinnapartin mikudagin hevði kommunan kortini onga slíka fráboðan fingið.

Arbeiðið er tryggjað, so tað skuldi ikki staðist nakar fíggjarligur missur av tilburðinum. Hvørki hjá kommununi ella teimum, sum møguliga hava verið fyri skaða.

Talan var ikki um áarlop sum so, sigur Hilbert Elisson, hóast slík ikki eru heilt ókend í Vestmanna.

Bratt er í bygdini, og serliga tá toybil er, eru áarlopini hervilig, sigur hann. Men hesaferð var bara talan um serliga nógv avfall, og tað gjørdi so, at rørini, ið løgd eru, meðan arbeitt verður, ikki kláraðu at taka ímóti.

Myndirnar hevur Jóan Pauli Wilhelmsen, umsjónarmaður hjá Vestmanna Kommunu tikið.

## Tøkk

Eina hjartans tøkk til øll tykkum ið mintust meg á mínum 90 ára degi við blómum, fjarritum, heilsanum og gjørdu mær dagin ógloymandi.

Vinarliga
**Jovina Jacobsen, Haldórsvík**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum gleddu meg á 90 ára føðingardegnum 17. oktober, tykkum sum komu í føðingardag, sungu fyri mær, sendu mær blómur og fjarrit, og ringdu meg upp. Tit gjørdu mær dagin minnisríkan.

Bestu heilsanir
**Andrew Godtfred**

# Eydnuhjól í Miðvági

**Áhugafelagið hjá Miðvágs Bóltfelag skipar fyri eydnuhjóli í bygdarskúlanum í Miðvági sunnudagin. Eisini verður lutaseðlasøla**

INNSAVNAN
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Miðvingar fara at hava eydnuhjól í bygdarskúlanum sunnudagin. Byrjað verður klokkan 17.00. Eisini verða lutaseðlar seldir.

Tað er áhugafelagið hjá MB, sum skipar fyri tiltakinum, sum er árligt afturvendandi tiltak, ið vanliga verður hildið hesa árstíðina.

Felagið sigur í tíðindaskrivi, at á lutaseðlunum verða góðir vinningar. Til dømis nevna tey 500 litrar av olju, føroyskt krov, ræstan fisk, lampu og tær um hesa tíðina obligatorisku karamellurnar, umframt ymiskt annað.

Sagt verður í tíðindaskrivinum, at tann peningur, sum inn kemur, verður brúktur til viðlíkahald av MB húsinum og av fótbóltsvøllinum.



# Jólamerkini eru jólatrøll

*Jólamerkini 2003 hevur listamaðurin Edward Fuglø teknað*

**Frímerkjadeildin hjá Postverki Føroya hevur sent jólamerkini 2003 á marknaðin. Í ár eru jólamerkini jólatrøll, soleiðis at skilja at í ár eru motivini bindingarmynstur. Um okkurt plagg ikki varð liðugt bundið til jóla varð tað jólatrøll**

JÓLAMERKIR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað er listamaðurin Edward Fuglø sum hevur teknað jólamerkini 2003. Hann hevur gjørt eitt ark við ymiskum bátsmanstroyggjumynstrum og jólanissum ella jólatrøllum.

Edward Fuglø teknaði eisini jólamerkini í 1997, 1999 og 2001.

Jólastákan er tiltikin, og var tað ikki minni á gomlu bóndagarðunum. Alt skuldi vera liðugt til jóla, og stór skomm var tað hildið at vera, um tað ikki eydnaðist at fáa okkurt liðugt, hann ella hon vóru farin í holt við. Hálvlidna verkið varð hongt upp í roykstovuni, so at øll kundu gera gjøldur burtur úr hesum jólatrølli, sum tað varð kallað.

Yvirskotið av jólamerkjasøluni fer sum vanligt til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum millum børn og ung í Føroyum. Millum annað hevur Jólamerkjagrunnurin latið stuðul til tiltøk fyri tey brekaðu og menningartarnaðu, ítróttar og skótaarbeiði og til bókaútgávur.


Tá ið móttøkan gerst ein tænasta

Optimeraðar arbeiðsgongdir
- Betri arbeiðsumhvørvi
- Hækkað tænastustøði
- Betri kundaviðgerð

Lægri kostnaðir
- Ókeypis samskifti millum uttanhýsis deildir
- Skjótari og færri telefonsamrøður
- Minni viðlíkahaldsútreiðslur

Siemens HiPath telefonskipanin er roknað til allar støddir av virkjum og stovnum, og koyrir yvir vanligt telefonnet umframt kt-net.

Saman við Totalview ritbúnaðinum fæst ein smidlig loysn, sum lyftir telefonskipanina inn í kt-umhvørvið.

Vilja tygum hava fleiri upplýsingar, vinarligast ringið á telefon 344000 ella send ein teldupost til totalview@formula.fo

formula.fo